# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*29. juli fekk Luisa Sofia ein litlabeiggja. Hann var 54 cm langur og vigaði 3620 gr. Foreldrini eru Gisela og Bogi Eliasen, Århus.*

25. juli fingu Berit Kloster og Terji á Toftini, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3000 gr.

31. juli fingu Marina Haraldsen og Tony Olsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3735 gr.

31. juli fingu Rannvá Dam og Høgni Berg, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

31. juli fingu Hansina Haraldsen og Jørmund Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

1. august fingu Rúna Skoubo og Hjarnar Krog Dalsgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2950 gr.

2. august fingu Rannvá Vestureið og Sámal Kristian Jacobsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3705 gr.

4. august fingu Elin Maria Iversen og Rógvi Róin, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3100 gr.

4. august fingu Ingun Justinussen og Uni Mohr, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3350 gr.

4. august fingu Katrin og Allan Mortensen, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4000 gr.

4. august fingu Kristina og Karl Leonsson, Argjum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3215 gr.

5. august fingu Birna og Terje Vestergaard, Glyvrum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3050 gr.

5. august fingu Hertha Jónsdóttir Simonsen og Rúni Olsen Ellefsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3310 gr.

6. august fingu Hertha Fríða Thomassen og Hans Ravnsfjall, Sandavági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3615 gr.

## Andlát

31. juli
Hilda Abrahamsen, Mykines, búsitandi í Havn, 85 ár

4. august
Petra Maria Joensen,fødd Lindberg, Havn, 86 ár

7. august
Gunnvá Reynheim Olsen, Hoyvík, 37 ár

## Minningarorð um
# Høgna á Steig



6. juli var minningardagur teirra deyðu í ferðsluni. Tíverri er hetta lagnan hjá alt ov mongum og teirra millum er Høgni á Steig.

Tað er nú gott ár síðani hendan meiningsleysa vanlukka hendi í Klaksvík og Høgni, hóast alt var gjørt fyri at bjarga honum, ikki slapp livandi frá tí. Tá man hugsar um tað, virkar tað so óveruligt, næstan surrealistiskt, men vit mugu ásanna, at hann er farin.

Vit minnist hendan morgunin at telefonin ringdi, og man fekk fortalt, at ein vanlukka var hend og at Høgni var komin illa til skaða, men man hugsaði als ikki, at hann ikki fór at klára tað. Hann var komin í góðar hendur á Sjúkrahúsinum, so tað mátti fara at ganga. Men sum tíðin fráleið, og vit vinfólk hjá Høgni ringdu runt til hvønn annan og væntaðu at fáa góð boð, ja so komu deyðsboðini.

Tað var ikki til at skilja. At hetta livandi unga menniskja skuldu fara foldum frá.

Høgni var júst blivin liðugur á kokkaskúlanum í Klaksvík og hevði ætlanir um, at fara niður til Danmarkar at læra víðari innan hetta yrkið. Fleiri av vinfólkunum skuldu eisini niður at lesa, so vit høvdu mangan tosað um, hvussu stuttligt tað fór at vera, at vit øll fóru at vera á sama stað. Tí var tað undarligt at fara niður og Høgni ikki var við. Hann manglaði og ger tað enn. Hann eigur at vera ímillum okkum!

Høgni hevði mong vinfólk og vit ið kendu hann, vita hvussu eitt erligt menniskja hann var. Har bleiv onki pakka inn. Hann segði tingini beint út og hetta er nakað, ið mangan skapaði látur, tí til tíðir kundi tað tykjast eitt sindur ógvisligt, men soleiðis var hann.

Tad var altíð gott at koma inn til Høgna. Har hevur man sæð nógvar filmar og hoyrt nógvan tónleik og mangt er blivið tosað um, bæði seriøst og óseriøst og tað er sjálvsagt nakað man saknar.

Eisini man tað vera hart fyri tykkum Berghild og Boga, Rannvá og Gunnar at venja tykkum við friðin, tí Høgni dámdi væl at hava fólk inni.

Nú eitt ár er fari framvið, er sorgin og saknurin ikki minnið. Tað er enn líka meiningsleyst, men lívið gongur sína leið. Vit eru noydd til at liva við tí. Okkara tankar ganga til tykkum foreldur, systkjin, dóttir og gentu sum hava mist tað dýrabarasta. Má Harrin styrkja tykkum.

Hóast Høgni ikki er ímillum okkum meir, so gevur hann okkum gleði. Vit vinfólk sita mangan og práta um Høgna, minnast afur á løtur vit høvdu saman og gleðast yvir tær løtur, hóast tær tíverri blivu alt ov fáar.

Æra verði minnið um Høgna á Steig! Tú vart eitt so fantastiskt menniskja!

**Tínir vinir**

## Fanny Nielsen 50 ár



Hósdagin 7. august fylti Fanny Nielsen í Trongisvági 50 ár. Fanny er ættað úr Fámjin, foreldrini vóru Jona og Niels Pauli Nielsen.

Fanny hevur fyrr arbeitt í handli á Tvøroyri. Seinastu 13 árini hevur hon arbeitt á dagstovninum "Mýrifípan" í Trongisvági, samstundis sum hon hevur annað vaskiarbeið. Hon er sera røsk og arbeiðssom, hvørt summar hoyggjar hon í Hovi.

Saman við Delmar Joensen úr Hovi eigur Fanny 3 børn: Maud, sum býr í Danmark, Anju, sum býr í Froðba, og Aron, sum býr heima. Tey eiga eisini tvey ommu- og abbabørn, drong og gentu.

Nøvn í vikuni

Kennir tú onkran ...

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein





NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Hjørdis og Edvard Vilhelmsen gullbrúdleyp

Mánadagin 11. august kunnu hjúnini Hjørdis og Edvard Vilhelmsen í Havn halda gullbrúdleyp.

Hjørdis er fødd 23. september 1927. Foreldrini vóru Bergitta, f. Juul, úr Funningi og Jóhan Berg úr Elduvík. Hjørdis er einabarn. Familjan búði í Søldarfirði, til tey seinni fluttu til Havnar. Hjørdis byrjaði sum ung at arbeiða á Telefonverk Føroya Løgtings sum ørindagenta og seinni sum telefondama. Hon arbeiddi har í 49 ár, til hon fór frá fyri aldur.

Edvard er føddur og uppvaksin í Havn. Hann er yngstur av 9 systkjum, foreldrini vóru Nicolina, f. Joensen, úr Skopun, og Christian Vilhelmsen úr Havn. Edvard hevur arbeitt sum múrari í mong ár, tey seinnu nógvu árini hjá Peturi Simonsen, múrarameistara, í Havn.

Hjørdis og Edvard dáma sera væl havaarbeiði og at ganga túrar saman.

Tey eiga fýra børn, tey eru: Sunrid, Kári, Jóhan og Sóleyð. Øll børnini búgva í Havn uttan Sóleyð, sum býr í Ebeltoft í Danmark. Ommu- og abbabørnini eru 10 í tali.

Dagurin verður hildin uppi Millum Gilja 1, Hoyvík, hjá soninum Jóhan, har opið hús verður frá kl 19.

# Tvíburar fylla 75

## Aslaug av Rana og Erland Jensen 75 ár





Í dag, 9. august, fylla tvíburarnir Aslaug av Rana í Trongisvági og Erland Jensen í Hvalba 75 ár.

Tey eru fødd og uppvaksin í Hvalba. Foreldrini vóru Magdalena, f. Jespersen, og Jenis Jensen, vanliga nevndur Jenis hjá Drikku, í Hvalba.

Aslaug giftist við Dánjal av Rana í Trongisvági. Dánjal er fyrrverandi fakfelagsmaður og býráðslimur. Hann var borgarstjóri á Tvøroyri frá 1985-93. Aslaug og Dánjal eiga børnini: Petur Karl, sum er bóndi í Trongisvági, Jenis, sum er lækni og løgtingsmaður og býr í Havn, Bjørg, sum er ljósmóðir og býr í Trongisvági, og Varna, sum er økonoma á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík.

Sum ung arbeiddi Aslaug í handli á Tvøroyri , annars hevur hon verið heimaarbeiðandi húsmóðir. Fyri umleið 15 árum síðan bleiv hon lutvíst lammað, men hon er komin væl fyri seg aftur. Aslaug og Dánjal eiga seks ommu- og abbabørn, fimm dreingir og eina gentu.

Erland er bóndi í Toftadali í Hvalba, hann yvirtók garðin eftir Vilhelm Sejer Hansen. Erland giftist við Gunhild, f. Ziskasen, av Hamri í Hvalba. Tey fingu dóttrina Miriam, sum býr í Hvalba. Gunhild doyði síðst í 70-unum.

Erland er kendur fyri at vera ein dugnaligur og røkin bóndi.

## Elisabeth Høgnesen 90 ár



Í dag, leygardagin 9. august, fyllir Elisabeth Høgnesen í Leirvík 90 ár. Elisabeth er fødd á Mýruni í Leirvík. Hon giftist við Karl Høgnesen (1900-1979), eisini úr Leirvík, tey fingu fimm børn.

Elisabeth arbeiddi í skúlanum og á flakavirkinum Frost í Leirvík fram til 1983.

Hon eigur 10 ommubørn og 8 langommubørn.

90 ára føðingardagurin verður hildin í heiminum í Leirvík.

## Durita Restorff sjúkrarøktarfrøðingur



28. mai 2003 fekk Durita Restorff úr Havn prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

*Kelda: VØKA 2-2003*

## Oddbjørg Johansen prógv



7. mars 2003 fekk Oddbjørg Johansen í Havn prógv í kognitivari terapi í Risskov.

*Kelda: VØKA 2-2003*

## Jóhanna Andreasen prógv



4. apríl 2003 fekk Jóhanna Andreasen í Havn prógv í kognitivari terapi í Risskov.

*Kelda: VØKA 2-2003*

## Dagurin

**9. august. Romanus,** deyður í umleið 250. Halgisøgurnar eru ikki á einum máli, um hann var ein umvendur rómverskur hermaður ella ein kristin prestur. Hálshøgdur varð hann í hvussu so er fyri trúar sakir.

**10. august. Laurentius.** Lavrasmessa. Laurentius var ein av teimum best kendu halgimonnum í Norðurlondum. Hann var prestur og skattmeistari hjá pávanum Sixtusi II. Í árinum 258 varð hann tikin og so illa píndur, at hann doyði.

Navnið er latín og merkir *hin lavrberjakrýndi.*

**11. august. Hermann.** Einki kent halgimansnavn, men er komið upp í álmannakkan í staðin fyri Tiburtius.
Navnið er týkst og merkir *hermaður*.